# Millumlanda samljóð og friður í Hoydølum



**Luttakandi londini á altjóða barnaleguni hjá CISV sýndu týskvøldið fram ymiskt, sum tey høvdu at bjóða uppá. Tiltakið var ein blandingur av nógvum ymiskum mentanum, einum felags ynski um frið og ynski um eina betri verð.**

OPEN DAY
*Heri á Rógvi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Open Day er heitið á tiltakinum, sum var í Hoydølum týskvøldið. Tiltakið myndar eitt kvøld av einari fýra vikur langari legu, sum seinastu vikurnar hevur verið í Hoydølum. Hetta er tó ikki nakað serstakt fyri Føroyar ella Hoydalar, men heldur er hetta ein altjóða felagskapur. Felagskapurin spennir rættiliga víða og verða legur hildnar kring allan heim á hvørjum ári. Við nøkrum ára millumrúmi standa Føroyar so fyri tørni at skipa fyri einari legu, meðan føroysk børn á hvørjum ári leita sær út í heim til legur - eisini í ár.

Luttakarnir á leguni eru fyrst og fremst 11-ára gomul børn. Tað eru fýra børn úr hvørjum landi, og við sær hava tey ein leiðara. Eisini eru nakrir sokallaðir ungleiðarar við á leguni, umframt tey, sum syrgja fyri at børnini fáa okkurt at eta og at alt gongur sum tað skal.

Sjálvur hevur undirritaði luttikið á einari tílíkari barnalegu, og liggja nøkur serstaka góð minni eftir frá teirri tíðini. Eisini høvdu vit nøkur amerikonsk børn búgvandi miðskeiðis í áttatiárunum. Eg minnist serliga, at hesi ikki hildu, at tað fór at vera møguligt at keypa góðgæti í Føroyum, so tey høvdu tikið ríkiligt við sær.



### Litríkt

Tiltakið týskvøldið byrjaði rættstundis, og fyrireikarnir høvdu gjørt nógv burturúr. Eftir at fólk høvdu fingið møguleikan til at hyggja seg um, hevði hvørt landi sær eina lítla framførsla. Tey flestu londini valdu at vísa ein dans, sum hevði tilknýti til landi hjá teimum. Eisini valdi eisini at syngja onkran sangin, og pláss var eisini fyri eitt sindur av upplýsingum um okkurt av londunum.

Tað var heldur ikki torført hjá áhoyrarunum at fáa eina fatan av, hvat ein tílíkur felagskapur snýr seg um. Amerikanska kvinnan Doris Allen setti eftir seinna heimsbardaga felagskapin á stovn við einum ynski um, at einki kríggj skuldi koma fyri aftur. Hesin boðskapur helt sær eisini væl uppi millum glaðu børnini í Hoydølum týskvøldið.

Tað er so avgjørt tankavekjandi, at børn og vaksin úr so nógvum ymiskum londum og mentanum kunna finna saman á henda hátt, og tú fór eisini heim aftur úr Hoydølum við einum lættari hjarta. Tú hevði sæð fólk sum trúðu uppá eina hugsjón, og hendan vinnur fram í gamansleiki.

### Føroyar og CISV eru fantastisk

Tveir av luttakarunum á leguni eru Raffy Reloza og Beth Kotierk. Beth er 11 ár og úr Kanada. Hon sigur seg hava havt tað sera stuttligt á leguni, og eisini heldur hon, at Føroyar eru eitt vakurt land. Beth dugir bæði enskt og franskt, men tosar enskt á leguni. Hon heldur, at Føroyar og Kanada líkjast á summum økjum. Serliga norðaru partarnir av Kanada minna ikki lítið um Føroyar, sigur hon.

Raffy Reloza er leiðari hjá børnunum úr Filipsoyggjunum. Hann ivast ikki, tá hann sigur, at Føroyar eru heilt fantastiskar. Eisini CISV felagskapurin fær sama skoðsmál frá fryntliga filipinaranum. Hann sigur, at tey koma frá einum meiri múgvandi parti av Filipsoyggjunum, og tey hava m.a. fleiri tænastufólk. Hann sigur maturin av fyrstan tíð kanska var ein lítil trupulleiki, men teimum dámar betri og betri. Veðrið er eisini rættiliga øðrvísi, men sum heild hevur tað verið eitt frálíkt upplivilsi, sigur Raffy.



*Raffy Reloza heldur nógv um Føroyar og føroyingar*

Jørgen Niclasen:

# Skal taka støðu til trý tilmæli

FISKIDAGAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Tungar byrðar hanga yvir herðunum á Jørgen Niclasen í løtuni, tí óansæð hvat hann ger, so verður onkur ónøgdur.*

Tons og tøl og fiskidagar singla í høvdinum á Jørgen Niclasen í hesum døgum, nú hann er settur til harra yvir hvussu nógvar dagar raskir sjómenn skulu sleppa at flóta og uppgávan er ikki løtt. Trý tilmæli skulu takast støða til og fiskimálaráðharrin kann heldur ikki enn nakar annar tæna fleiri harrum.

Fiskirannsókranstovan við stjóranum Hjalta í Jákupstovu á odda heldur at verandi fiskidagaskipan er ikki rætt innstillað soleiðis at veiðan er burðardygg. Fiskirannsóknarstovan heldur at veiðutrýstið liggur væl omanfyri tey 33 prosentini, sum verður roknað sum burðardygg veiða, verða hesi fiska av hvørjum stovni.

Fiskirannsóknarstovan mælir til at skerja veiðutrýstið við 25 prosentum fyri før innan fiskidagaskipanina og eisini tey sum eru uttanfyri, eitt nú lemmatrolararnar. Tilmæli er galdandi fyri tosk, hýsu og upsa.

Ein meiriluti í fiskidaganevndini mælir til at halda fram við verandi veiðutrýsti og ikki skerja fiskidagarnar. Teir grundað hetta við, at stovnarnir eru hampuliga væl fyri og at livilíkindini í sjónum eru fram úr góð í løtuni.

Ein minniluti í fiskidaganevndini, formaðurin Atli Gregersen, mælir til, at fiskidagatalið verður skert við 6 prosentum.

-Eg eri í tíðarneyð og havi miðað í móti at avgreitt málið hesa vikuna,.men sum tað sær út nú, so koma vit helst inn í fyrru helvt av næstu viku, áðrenn nakað úrslit fyriliggur, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

# »ArticViking« kvotu í Vesturgrønlandi

RÆKJUBÁTAR
*Justinus Leivson Eidesgaard*

Rækjutrolarin »Artic-Viking« úr Kollafirði hevur keypt eina kvotu upp á 1000 tons frá einum reiðarí í Grønlandi..

-Vit hava keypt hesa kvotuna, tí vandi kann vera fyri, at tað gerast ov fáir fiskidagar á Flemmish Cap, sigur Johan Joensen, reiðari á »Artic Viking«

-Men hetta verður so bara i árø Vit hava fingið hesa kvotuna, tí grønlendingar bíða eftir einum nýbygningi, sum ikki er liðugur enn. Vit sleppa at fiska kvotuna í Vesturgrønlandi.

»Artic Viking« er longu farin til fiskiskap í Grønlandi. Skipari hendan túrin er Bjarni Petersen úr Kollafirði.



# Øll skip skulu undir fiskidagaskipanina

FISKIDAGASKIPANIN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



Fiskirannsóknarstovan heldur ikki at fiskidagaskipanin virkar til fullnar, tí ikki allir skipabólkar eru undir skipanini. Í tilmælinum til fiskimálaráðharran um veiðuna í komandi ári hevur Fiskirannróknarstovan gjørt sær nakrar tankar um hvussu fiskidagaskipanin virkar.

Fiskirannsóknarstovan metir við støði í stovnsmetingunum undir Føroyum síðani 1961, at veiðutrýstini, ið miðað verður eftir í lógini um vinnuligan fiskiskap, eru ov stór. Av tí, at lívfrøðin hjá toski, hýsu og upsa er ymisk, og at stovnarnir av nevndu sløgum tí ikki tola líka stóra roynd, so ber ikki til at áseta sama veiðutrýst á hvønn. Hetta er í tráð við bæði ráðgevandi nevndina hjá ICES og frágreiðingina hjá John Pope. Frá stovnsmetingum síðan 1961 ber m.a. til at rokna, hvat veiðutrýstið skal vera, fyri at tilgongdin kann klára at halda gýtingarstovninum oman fyri eitt rímiligt minstamark; hetta veiðutrýstið verður nevnt Fmed, og tað er grundað á m.a. hetta virðið, at Fiskirannsóknarstovan og ICES undir vanligum umstøðum mæla til hesi veiðutrýst:

### Bert 27 % av toskastovninum

Toskur á Landgrunninum eini 27%, hýsa eini 20% og upsi eini 22% av tí fiskibara stovninum.

Um ein gýtingarstovnur verður mettur at nærkast lívfrøðiliga minstamarkinum, er neyðugt, at ein ætlan verður gjørd fyri at loyva gýtingarstovninum at vaksa aftur; hetta gerst við at minka um veiðutrýstið.

Ein fortreyt fyri, at dagaskipanin skal virka í einum blandaðum fiskiskapi, er, at veiðutrýstið í eitt áramál í miðal ikki verður hægri, enn miðað verður eftir, og at einstøku gýtingarstovnarnir tey árini, tá veiðutrýstið er høgt, ikki verða fiskaður undir tað, sum er lívfrøðiliga ráðiligt. Hetta krevur, at stovnarnir í ein vissan mun eru komplimenterir við atliti til avreiðingarvirði og veiðuflota. Seinnu árini hava vit sæð t.d., at avreiðingarprísurin á upsa hevur verið vánaligur, meðan prísurin á toski hevur verið met høgur. Hetta merkir, at tað hevur loyst seg betri at royna eftir toski, hóast veiðan hevur verið minkandi, enn eftir upsa. Úrslitini eru, at sveiggjið í veiðutrýstinum kann verða størri, enn skipanin tolir. Sum dømi kann nevnast, at um veiðutrýstið í tvey ár er dupult so stórt, sum miðað verður eftir, so má veiðutrýstið komandi fýra árini verða helvtina minni, enn miðað verður eftir, um rakast skal rætt yvir eitt seks-ára skeið. Skipabólkarnir eru heldur ikki komplimenterir í mun til, hvørji fiskasløg roynt verður eftir. Partrolarnir kunnu royna frítt eftir upsa, men hava samb. lógini ikki loyvi til at fiska meiri enn 25% av ávikavist toski og hýsu, meðan húkaflotin mest fiskar tosk og hýsu.

### Allir bólkar undir dagaskipanina

Fiskirannsóknarstovan metir tað vera sera óheppið, at ikki allir skipabólkar undir Føroyum eru undir dagaskipanini. T.d. er tann økta veiðan eftir toski hjá lemmatrolararunum nakað, ið hædd ikki er tikin fyri í dagaskipanini. Nevnast kann, at hesin bólkur í 1999 og 2000 hevur staðið fyri umleið 20% av tí samanlagda veiðutrýstinum á tosk, og er hetta nógv meira, enn roknað varð við, tá dagaskipanin varð tilevnað.

Fyri at fáa sum mest burtur úr fiskastovnunum er neyðugt at friða smá- og ungfiskin sum mest, tí at vøksturin á fiski er nógv størstur tey fyrstu árini. Hetta hevur samstundis við sær, at fleiri fiskar náa at gýta, áðrenn teir verða fiskaðir. Verandi skipan við stongdum leiðum fyri ávísar reiðskapir og m.a. áseting av minst loyvdari meskavídd í trolposunum er fyri part eftir hesum leisti, men stórur partur av fiskiflotanum sleppur at royna á smá- og ungfiskaleiðum. Úrslitið er, at eitt sera stórt tal á fiski verður fiskað alt ov tíðliga, hóast nøgdin í tonsum ikki er so stór. Um hesar leiðir vórðu stongdar fyri vinnuligum fiskiskapi ella bert vóru opnar fyri úrveljandi reiðskapi, ið yvirhøvur fiskar stóran fisk, vildi væl meira fingist burtur úr tilfeingingum enn nú.

# Fiskifrøðingar um stovnarnar

STOVNAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í tilmælinum til landsstýrismannin í fiskivinnumálum hevur Fiskirannsóknarstovan gjørt hesar metingar av teimum einstøku stovnunum undir Føroyum:

Toskastovnurin á Landgrunninum. Gýtingarstovnurin er hampuliga væl fyri. Hann hevur verið í minking seinastu árini, men nú er vent aftur, tí góðir árgangir eru komnir inn í stovnin, og vøksturin á fiskinum er sera góður. Veiðutrýstið er tó alt ov høgt, og stovnurin vil tí sjálvt við verandi sera góðu líkindum í sjónum fara at minka aftur um nøkur ár, um ikki veiðutrýstið ikki fæst niður á eitt meira hóskandi støði.

### Hýsa

Gýtingarstovnurin hevur verið í minking seinastu trý árini, tí at veiðutrýstið hevur verið alt ov høgt, samstundis sum at bara tveir góðir árgangir hava verið inni í stovninum, og er hann nú mettur at verða illa fyri. Verður hugt at øllum stovninum, er støðan ikki heilt so ring, tí ábendingar eru um, at nýggir frægari árgangir eru komnir inn í stovnin. Um hesir árgangir fáa umstøður at vaksa, og um veiðutrýstið kemur niður á eitt meira hóskandi støði, vil gýtingarstovnurin tí helst vaksa nakað aftur næstu fáu árini.

### Upsi

Gýtingarstovnurin er hampuliga væl fyri, tí at tilgongdin yvirhøvur hevur verið góð síðani miðskeiðis í nítiárunum. Hinvegin er veiðutrýstið nógv vaksið seinastu tvey árini, og um tað ikki fæst niður á eitt meira hóskandi støði, vil gýtingarstovnurin komandi árini fara at minka aftur.

### Toskur á Føroya Banka

Hóast stovnurin hevur verið í minking seinastu árini, so er hann mettur at vera hampuliga væl fyri og í vøkstri aftur. Ábendingar eru um, at tilgongdin í seinastuni er góð. Royndirnar hava víst, at stovnurin er viðbrekin ímóti einum høgum veiðutrýsti, og tí eigur at fiskast við varsemi.

### Kongafiskur

Veiðan av kongafiski undan Føroyum er støðugt minkað síðan 1986 (21500 t) og var í 2000 einans 6500 t. Tað ber ikki til við vissu at rokna støddina av stovnunum av kongafiski, ið verða fiskaðir við Føroyar, t.e. stóri kongafiskur (Sebastes marinus) og trantkongafiskur (Sebastes mentella). Eingin ivi er tó um, at stovnarnir hava verið ovveiddir í fleiri ár og eru á einum lágum støði. Serliga stóri kongafiskur er illa fyri. Tað eru tó tekin um, at nýggir árgangir eru á veg inn í báðar stovnarnar.


